### Johan og Frida Evensen:

# Mylius Erichsen í barnadóp

**Umframt hesi trý í Müllerættini, so var eisini ein fjórði føroyingur um hesa tíðina kolonistjóri í Grønlandi. Hetta var Johan Evensen. Hann hevði tað ættarliga samband við Müllerættina, at fastur hansara Elsebeth Christine gjørdist vermamma Søren Müller. Maður hennara Christoffur Michel Olsen var eisini systkinabarn gamla H.C. Müller**

Kolonistjórarnir í Grønlandi hava havt samband við teir granskarar og ævintýrarar sum vitjaðu í Grønlandi. Hetta hava Frida og Johan Evensen eisini havt.

Ein áhugaverd frásøgn er um, tá ið Ludvig Mylius Erichsen kom framvið í 1903.

Hann var ein sera kendur rithøvundur og polargranskari. Men hann hevði eisini verið í Føroyum. Vit hava fyrr havt frásøgn hjá Petur Alberg frá donsku studentaferðini til Ísland í 1900, tá ið teir steðgaðu í Føroyum. Tá var Mylius við. Á hesi ferðini kom hann at kenna Knud Rasmussen, sum var við sum studentur. Teir komu seinni at samstarva nógv við kanningarferðum í Grønlandi.

Mylius leiddi í 1902-04 ta sokallaðu "littereru" Grønlands - kanningarferðina, har hann saman við Knud Rasmussen og málaranum Harald Molke kom fram til Thule. Hann var eisini leiðari hjá teirri sokallaðu Danmarkarkanningarferðini 1906-08, har hann umkomst saman við Høeg Hagen og Jørgen Brønlund á heimferðini frá Danmarkshavn eftir at hava kortlagt norðara partin av Eysturgrønlandi. Hetta økið er uppkallað eftir honum.

Á síni lagnuferð til Grønlands legði Mylius at í Føroyum, har hann tók nakrar mans umborð. Ein av hesum var umrøddi Jørgen Brønlund. Hvat man hann hava gjørt í Føroyum?

Mylius Erichsen var ein heitur talsmaður fyri rættindunum hjá grønlendingum mótvegis myndugleikunum.

Tað var í samband við fyrru umrøddu kanningarferðina, at Erichsen vitjaði Evensenshjúnini, júst í teimum døgum, tá ið dóttirin Lisbeth skuldi doypast.

Í hesum sambandi skrivaði hann eina yrking til heiðurs fyri hendan lítla føroyingin, og fara vit at endurgeva hana her. Hann skrivaði yrkingina bæði á donskum og grønlendskum, sum hann eisini var kønur í.




Partur av upprunahandritinum hjá Mylius Erichsen

### Ved Dåbsfesten i Umanaks Bestyrerbolig 1. marts 1903

Der ligger i Vuggen et lillebitte Nor,
som endnu ikke aner, hvor Verden den er stor,
hun sanser ikke Larmen
fra Livets Stride Elv,
hun ligger blot i Varmen
og slumrer i sig selv,
en Blomst i Bægre svøbt,
en Sjæl med Navne døbt,
et Menneske, der ikke ved, at Liv er Dyrekøbt.

Du spæde i Vuggen. Hvordan dit Liv vil gå?
Ja, det kan ingen vide og ingen Moder spå.
Og ingen Ønsker gode
kan skabe dine Kaar,
din Skæbne er en Klode,
som egne Cirkler slår.
Men alt, hvad Far og Mor
kan hjælpe deres Nor,
det gør de for at skærme dig, til du er blevet stor.

Thi da skal du lære, at dit unge Sind
har mangen herlig Evne sine Spire podet ind.
Din Moders kære Stemme
har evigt Ekko lagt,
og med din Faders Nemme
er din Natur i Pagt,
men hvad du ikke ser,
og som betyder mér
er dybest i dit Hjærteblod din egen Karakter.

Og kommer der Tider, hvor Lykken bliver trang,
og du har glemt at synge din Moders Vuggesang,
men mest når Selvanklage
har vist sig dine Brøst,
og du kan ikke tage
af Moders hånd din Trøst,
da må du som en Elv,
udrense dybt dit selv
og bygge Søjler inderst fra til Lykkens Himmelhvælv.

Aa! Vidste vi bare, hvad der i din Sjæl
er gemt,
om den har stærke Strenge til rene Toner stemt.
Thi én gang vil der flagre
en anden Sjæl til din
og kalde dig den fagre,
han ønsker sig som sin,
og om du giver Køb,
da bryder Bægrets Svøb,
og du skal blomstre stolt i et Nu i Evighedens Løb.

Du fødtes højt oppe mod den hvide Pol,
men ude over Isblinken lér den rige Sol,
de Straaler op ad Fjælde
beklædt med evig Sne –
tænk! Al den lyse Vælde
skal snart dit Øje se.
Bliv lys om Barnekind
bliv ren og hvid i Sind
bliv skøn og ubekymret som Umanakkens Tind.

p.t. Umanak 1.3. 1903

L. Mylius Erichsen

Elisabeth var fødd 2. februar 1903 og varð so doypt í kirkjuni í Umanak 1.marts. Gumma var Mathilde Bådsgård, kona prestin.

Gubbar vóru pápabeiggin Jens Evensen og mammubeiggin Johan Evensen, sum báðir búðu í Havn. Teir hava neyvan verið til staðar, men frástøðan hevur so ikki verið nøkur forðing fyri at átaka sær gubbaábyrgd!

Elisabeth varð seinni send til Danmarkar saman við beiggjanunum Åge. Seinni kom hon at búgva saman við mammuni, tá ið hon flutti niður, eftir at pápin var deyður. Hon giftist ikki og arbeiddi í Landbúnaðarmálaráðnum sum enskur tulkur. Elisabeth doyði 25. februar 1979.

## Søgan hjá Johan

Í 1887 kom Johan at arbeiða sum "volontør" hjá KGH í Keypmannahavn. Tann 1. apríl 1891 fekk hann eitt líknandi starv í Upernavik í Grønlandi. Í 1893 gjørdist hann assistentur í Prøven og í 1895 í Umanak.

Frá 1898 til 1899 hevði Johan farloyvi í Føroyum. Í 1902 gjørdist hann settur kolonistjóri í Umanak, í 1905 kolonistjóri í Rittenbenk, í 1907 kolonistjóri í Umanak og í 1908 í Egedesminde.

Johan varð 22. marts 1899 giftur í kirkjuni á Nesi við systkinabarni sínum Margrethe Frederikke, vanlig nevnd Frida, Evensen, dóttir Onnu og Jens Christian Evensen. Hann var próstur tá og vígdi eisini tey bæði.

Tey fingu børnini Åge (1901-1915), Elisabeth (1903-1979), Vagn (1905-1973) og Gudmund (1908-1979). Øll børnini eru fødd í Grønlandi og deyð í Danmark.

Vagn átti í hvussu er børnini Johan Evensen, sum hevur verið politimeistari í Varde og Bodil Davidsen, sum fyri nøkrum árum síðani var og vitjaði slóðina hjá abbanum í Grønlandi, og sum er kelda til hesa frásøgn. Men tað hevur vist ikki verið nakað serligt samskifti við føroysku ættina.

Johan doyði longu í 1913 av nýrabruna í Egedesminde, har hann er grivin. Hann gjørdist bert 43 ár. Tá er Frida flutt til Danmarkar.

Minningarorð um hann vóru í Det grønlanske Selskabs Årsskrift í 1913, har tað millum annað varð sagt:

Under et lidt tilbageholdende Væsen skjulte Evensen en sjældent brav og nobel Karakter, og til trods for at han ikki gjorde sig umage for at blive populær, var han dog en af de danske Embedsmænd, som Grønlænderne holdt meget af, da de så ofte i Handling havde Lejlighed til at bemærke hans brave Karakter og hans gode Hjertelag.

I sin Embedsførelse lagde Evensen ubestridt stor Dygtighed for Dagen.



*Mylius Erichsen kom á gátt hjá Fridu og Johan Evensen*



*Elisabeth, sum Mylius yrkti til*

*Í komandi pørtum verður meira áhugavert tilfar um Johan Evensen og um Evensen ættina yvirhøvur*

Sosialurin